

Hann ætlaði sær at ganga við posti í eitt ár. Starvstíðin hjá honum gongur nú á nítjanda ári

*Framhald av síðu 19*

ára aldur, sum heldur lívið vera so eviga deiligt, noyðist Hallstein aftur at festa sær í. Og meðan romantiski útvarpsverturin letur Al Barton tóna við Living Next Door To Alice, fær postmaðurin sær eitt sterkt lakerol afturímóti slitnu rútmunum.

**Øll smílast**

Eftir stuttari løtu er hann komin til húsini hjá Lassa Holm og har við í helvt í Kvívíkar bygd. Nú vanta bert góð fjøruti hús í hesi bygdini. Tey flestu frammi í Gerði. Prátini við tey viðskiftafólkini, ið eru heima, eru stutt. Hóast Hallstein er klaksvíkingur, fær hann onki skot um skottilburðin í Klaksvík. Bara »smalltalk« um góða veðrið og spurningar um teir báðar blaðmenninar, ið renna í hølunum á honum. Men øll hava hug at smílast, tá ið Hallstein kemur við posti. Serliga konufólkunum dámar væl sjarmerandi og spontana mannin í bláa jakkanum og slitnu kóboybuksunum.

**Annað lívið í Havn**

Nakrar serkendar mýtur eru um postmenn. Hana við hundunum, sum altíð bíta postmenninar, munnu fólk flest kenna. Men so er tað hin um postmannin, sum í skemtitekningum sleppur sær framm at hjá einsamøllum konum.

Tey nítjan árini, Hallstein hevur gingið við posti hevur hann verið í hornatøkum við mangan hundin. Men hitt hevur hann enn til góða.

- Einaferð kom eg av óvart fram á nøkur konufólk, sum lógu og sólaðu sær her um leiðir. Sum vera mann, skundaðu tær sær at lata seg betur í, tá ið tær sóu meg koma gangandi. Eg spurdi undrandi, hví tær lótu seg í. Í Havn, segði eg, har lata tær seg úr tá ið postmaðurin kemur. Tær fingu ikki afturhald, sum tær flentu, minnist Hallstein, og flennir sjálvur í kíki.

Tað svingar, tá ið Hallstein tosar við konufólkini. Tær flestu, sum vit fáa eina viðmerking frá, halda Hallstein vera ein sera litríkan persón. Og summar standa eftir í durðunum við einum fjarum smíli um varrarnar, tá ið hann kvikar sær víðari.

**Stuttar vitjanir**

Klokkan er tólv, tá ið vit veitra Kvívíkar bygd farvæl. Hallstein koyrir varðliga móti Leynatunnlinum. Seinasta vetur knústi hann ein postbil har á leiðini. Hann festir sær í aftur.

Nú eru bert tey fremstu húsini í Kollafjarðardali og Signabøur eftir. Men hesar vitjanir eru tíðarkrevjandi, tí pensiónistarnir skulu hava sín pening. Hóast farið er um miðdag, og nógv húski enn bíða eftir posti, pengum og tíðindum, kennir Hallstein ikki størri strongd á sær, enn hann hevur gjørt. Vitjanirnar inni hjá bíðandi pensiónistunum eru stuttar. Sum ein roynd bankakona telur hann seðlar og myntir meðan tey gomlu sita kúrr og eygleiða títtu fingrarnar. Farvæl og takk fyri, vælsignaður.

**Kaffi og orðaskifti**

Nú nærkast hann endanum. Klokkan er tjúgu minuttir í tvey. Eini tredivu hús eru eftir. Hann tekur dik á seg; blaðmenninir hava seinkað honum minst ein tíma. Oyrareingir er seinasti býlingurin. Her eru tólv hús. Seinastur er bóndin á Oyrareingjum, Óli Krisjan Debess. Her plagar Hallstein at verða boðin inn á gólvið. Afturvið kaffi og køku verða dagsins mál vend. Bóndin er rótgrógvin fólkafloksmaður. Og Hallstein er, sambært bóndan, ógrøðiligur sosialistur. Teir eru væl, báðir, men politiskt rúkandi ósamdir.

Tá festir Hallstein sær javnan í aftur.

**Troyttur sjarmørur**

Klokkan er tvey og reiðiliga tað, tá ið blái bilurin við nummarplátuni PJ209 fer norður um aftur og út á posthúsið við Sjógv. Dagurin er skjótt farin. Hallstein fer nú at rigga av. Telja upp kassan, stempla brøv og fáa skil á tað, ið liggur eftir.

Proletarurin og sjarmørurin í kóboybuksunum tykist troyttari enn í morgun.

Δ



Dánjal Magnussen í Kvívík er á veg at taka kalvalínu upp. Fiskiskapurin er sambært gamla sakføraran, bedrøviligur. Men nú Hallstein kemur við bløðunum gjøgnum bilgluggan, livnar hin gamli upp aftur. »Hallstein er altíð í góðum lag, men hann hevur ikki nóg góða tíð at práta«, heldur Dánjal, sum hevur alt gott at bera manninum, ið berur honum postin



- Kvæd ólukkan gera tygør so manssterkør? Suðringurin á takinum, Ásbjørn Eysturberg, tekur rívan til, tá ið hann sær alt rennaríið rundan um Hallstein í skotunum í Kvívík



Ivi hevur stungið seg upp um eitt bræv. Bjarna, sum er komin heim av Flatlondum at vitja í Kvívík, kennist ikki við navnið, sum stendur á bjálvanum. Hóast hon býr í Keypmannahavn, finnur hon kortini skjótt út av, at Hans frammi í Húsi eigur brævið



»Hasin maðurin er all-right, og hesin dagurin er ikki minni góður«, sigur blíðskortaði Poul Samuelsen í Kollafirði, tá ið Hallstein hevur handað honum pensiónina. Poul heldur eisini argandi fyri, at konan, Esther, gjarna fær eitt sindur meira útgoldið enn hann






Forvitnar gamla tíkir mugu víkja fyri postmanninum. Her er Hallstein komin út á Signabø. Vóvarnir hjá bóndanum er fleiri í tali, men somikið friðarligir, at neyðugt er ikki við álvarsomum tiltøkum til tess at fáa teir at flyta seg



Dagurin fer at halla, nú Hallstein er afturkomin á posthúsið í Kollafirði. Hann stemplar tey brøvini, hann hevur fingið við sær frá viðskiftafólkum í postøkinum. Síðani skal kassin teljast upp. Hallstein er móður og svangur